# Somu ljóð, nýtt úttrykk




**Eg havi somu ljóð, sum eg hevði, tá eg byrjaði í Happy. Men eg havi lært at brúka tey. Tú kanst geva einum øðrum gittarleikara míni ljóð, uttan at hann fer at ljóða sum eg. Mín máti at brúka tey er komin innanífrá. Útrykkið er broytt, men ljóðið er tað sama, sigur Rasmus, ið mánadagin gevur sína aðru fløgu sum einstaklingur út.**

SAMRØÐA
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Mánadagin kemur onnur fløgan hjá Rasmusi Rasmussen sum einstaklingi út. Fløgan Edelweiss er instrumental fløga, við tónleiki, ið best kann lýsast meditativur. Tónleikurin liggur langt frá rokkbólkinum Makrel, har Rasmus áður hevur verið drívmegi, gittarleikari og tónasmiður. Men eisini langt frá fyrstu fløguni hjá Rasmusi, Implossive, ið kom út í 2003.

Vit hittu gittarleikaran, ið á AME 2005 varð valdur til besta gittarleikara í Føroyum, og práttaðu við hann um nýggju fløguna.

## Fløgan hendi bara

Rasmus greiðir frá, at lopið í tónleikastíli, ið vit uppliva á fløguni, mest sum bara er hent.

- Eg byrjaði at gera løg eftir, at vit høvdu gjørt Transcend við Makrel. Hesaferð arbeiddi eg annarleiðis enn eg plagi. Eg plagi at byrja við gittara, men nú tók eg rútmir niður av internetinum. Eg byrjaði at klippa tær saman og pasta, leggja delay á og reverb, síðan jammaði eg afturvið groovinum. Soleiðis havi eg ikki arbeitt fyrr. Við at arbeiða við rútmum kemur okkurt annað fram, t.d sumt sum er meira uppbeat og okkurt, sum er korny á ein máta, sum mær dámar, greiðir Rasmus frá.

- Henda fløgan er nokkso minimalistisk. Eg havi ikki lagt meira á løgini enn neyðugt. Um eg var nøgdur við eitt lag, so lat eg vera við at gera meira. við tað. Á hesari fløguni hevur stemningur høvuðsleiklutin. Hetta eru stemningslandsløg. Fløgan handlar um stemningskifti. Stemningar er tað, sum mær dáma best at arbeiða við innanfyri tónleik, sigur Rasmus.

## Spælir øll ljóðføri

Rasmus spælir á fløguni nærum øll ljóðførini. Hann hevur forritað rútmir, spælt ljómborð og gittar. Einasta íkastið uttanífrá er luttøkan hjá fiólleikaranum Johannes Jung Christensen á lagnum Desolate. Hetta er gomul upptøka frá tíðini, tá Rasmus var á tónleikaeftirskúla í Danmark. Hon hóskaði saman við hinum løgunum, og varð tí tikin við.

Meðan Rasmus sjálvur sang á fyrstu fløguni, Implosive, so er hendan fløgan instrumental. Rasmus greiðir frá:

- Flestar fløgur hava vokal, sum man lurtar eftir. Seinastu tíðina havi eg lurtað eftir fleiri bólkum, sum ikki hava vokal, eitt nú God Speed You Black Empereur og Mogwai. Hetta gevur aðrar lurtaraupplivingar. Eg sang á fyrstu fløguni. Eg eri ikki sangari, men á tí fløguni vildi eg gjarna royna meg av innanfyri ymiskt. So eg gjørdi alt møguligt á tí fløguni. Har var eisini okkurt instrumentalt, og eg vildi gjarna gera meira av tí hesaferð. Tað er eisini lekkurt at hava tónleik, sum ikki krevur so nógv av tær. Tað er feitt at hava onkra fløgu í fløgusavninum, sum skilur seg frá hinum, greiðir hann frá.

## Primitiv upptøkutól

Rasmus hevur sjálvur tikið fløguni upp á einum primitivum 4 spor bandupptakara, við einum gomlum ljómborði. Hetta er sambært Rasmusi eitt sindur við síðuna av tí vanliga.

- Men hvør setur mørkini, um hvat man kann brúka. Eg royni at fáa tað besta burturúr tí, sum eg havi. Eg tók eina rúgvu upp, og hevði nógv tilfar. Fyri nøkrum mánaðum síðan, fór eg at lurta eftir tí sum eg hevði, og valdi so tað út, sum eg havi á fløguni. Eg havi arbeitt nógv við at skipa tilfarið. Hvat skuldi eg byrja við, hvat skuldi eg enda við, og hvat skuldi vera momentið. Eg hugsaði tildømis um at taka okkurt tilfar, sum ikki kom við á Implosive, men tað passaði ikki inn, sigur Rasmus

## Trupult at vera einsamallur

Rasmus viðgongur, at tað er stórur munur á at arbeiða einsamallur og at vera partur av einum bólki. Á eini bólkafløgu stuðla allir limirnir uppundir, á eini solofløgu er tað bara tú.

- Tað hevur verið mega ringt. Eg hevði nógv hugskot, men hvat skuldi eg gera við tey. Skuldi eg hava tey fyri meg sjálvan, ella skuldi eg lata fólk hoyra tey, sigur Rasmus.

Ein av avgerðunum var hvat heitið á fløguni skuldi verða.

- Eg visti, at hon skuldi eita heitið á einum av løgunum, og Edelweiss er vakrasta lagið á henni. Eg helt eisini, tað heitið vera gott. Men sum heild er tað rættiliga tricky at geva løgum á eini instrumentalari fløgu heiti. Men tey heitini, ið eru á Edelweiss eru komin av kenslum, ið eg fekk, tá eg arbeiddi við fløguni. Eg haldi eisini, at heitini og løgini á onkran hátt fylgjast at, greiður Ramsus frá.

## Sama ljóð

Rasmus hevur eitt sera egið gittarljóð, og hetta hoyrist eisini á fløguni. Men hvar kemur ljóðið frá.

- Eg havi somu ljóð, sum eg hevði, tá eg byrjaði í Happy. Men eg havi lært at brúka tey. Tú kanst geva einum øðrum gittarleikara míni ljóð, uttan at hann fer at ljóða sum eg. Mín máti at brúka tey er komin innanífrá. Útrykkið er broytt, men ljóðið er tað sama, sigur Rasmus.

Rasmus hevur hesi árini spælt í bólkum sum Diatribes, Makrel og Deja Vu, og øll hesi samstørvini hava givið honum okkurt.

- Eg havi lært nógv av øllum, sum eg havi samstarvað við. Hvør hevur sítt, og man lænir gullkorn frá hvør øðrum, tað er ótrúliga gevandi. Tað mesta, ið eg havi lært, havi eg lært frá øðrum tónleikarum. Eg havi ikki gingið til frálæra. tað mesta er sjálvlært. Eg eri ikki ein serliga tekniskur gittaristur, og eg havi ongantíð spælt lániløg. Tónleikaliga leiti eg enn, sigur Rasmus.

## Ljósareyður húsi

Fløguhúsan hava Niels Arge Galán og Uni Árting gjørt, hann er rættiliga serligur við sínum ljósareyða liti. Temaði á fløguni er íblást av myspace síðuni hjá Rasmusi, ið eisini er ljósareyð.

- Eg eri vælnøgdur við fløguhúsan, teir báðir gjørdi eisini mín fyrra húsa, og tí valdi eg teir aftur. Teir fingu fríðar teymar, men húsin skuldi hóska saman við mínum ljósareyða myspace profili, hann er mín almenna heimasíða, so tað skuldi hóssa saman. Ljósareytt er eitt flipp, ið eg fekk. Mær dámar væl litin. Hann er korny, men mær dámar hann álíkavæl.